# Føroyskur skíðinstruktørur



Soleiðis sær tað út, tá skíðað verður í tjúkkum kava



Eyðun Joensen er útbúgvin sum skíðinstruktørur í Kanada

Havnarmaðurin Eyðun Joensen hevur nýliga tikið útbúgving sum skíðinstruktørur í Kanada. Eyðun er 31 ára gamal og siglir annars sum maskinmeistari við Mærsk.

Útbúgvingin til skíðinstruktør var frá januar til apríl í ár og tók honum sostatt 12 vikur. Útbúgvingin gekk fyri seg á Whistler/ Blackcomb fjøllunum, tríggjar tímar frá Vancouver við Stillahavið. Eyðun var saman við 23 bretum, sum eisini gingu á instruktørskúlanum. Meðan tey vóru har, skifti hitin millum minus 17 stig til pluss 15 stig. Í desember, áðrenn tey komu, hevði verið sera kalt, heilt niður í minus 35 stig.

Umframt alt sum hevur við sjálva skíðingina at gera, skal ein skíðinstruktørur eisini duga at analysera kavan, um tað er ráðiligt at skíða og eisini at leita eftir fólki, sum eru saknaði.

Nógvastaðni í Kanada er skíðing ein lívsstílur. Í skíðsesongini hava skúlabørn t. d. frí hvønn mánadag, tá tey standa á skí ístaðinfyri at vera í skúla. Skíðing er eitt fak í skúlaundirvísingin har.

Eyðun nevnir sum dømi, at ein 92 ára gamal maður dagliga stóð á skíð, har sum tey vóru. Á skístøðunum møtti hann annars nógvum danskarum og eisini onkrum íslendingi.

Tá vit spyrja Eyðun, hví hann hevur valt at taka hesa útbúgving, sigur hann at hetta er ein gamal dreymur. Hann hevur gott starv hjá Mærsk, men møguliga fer hann at arbeiða sum skíðinstruktørur seinni.

Hann er limur í CSIA (Canadian Ski Instructors Alliance), og kann arbeiða sum skíðinstruktørur í flestu støðum í heiminum. Eyðun sigur, at honum vitandi er hann einasti føroyingur við hesi útbúgving.

Olympisku vetrarleikirnir í Vancouver, sum vera í februar, og Paraolympisku leikirnir sum vera í mars 2010, koma eisini at ganga fyri seg í Whistler, har sum Eyðun hevur lært til skíðinstruktør

Nógvar heimsstjørnur innan skíðítróttin koma úr lítlu bygdini Whitsler.

Lítla bygdin Whistler hevur uppfostrað nógvar kendar heimsmeistarar í skíðing gjøgnum tíðirnar. Vit kunnu t.d. nevna Shane McConkey sum var ein av kendastu skíð-stuntmonnum. Hansara sergrein var at skíða út av tindum og síðani hála í fallskermin. Tann 26. marts í ár var hann í Italia, har hann framdi slíkt stunt. Tá vildi so illa til, at hann ikki fekk skíðurnar av sær í góðari tíð, og endaði hann sostatt í fríum falli, tí fallskermurin ikki foldaði seg út.

Ein orsøk at ein so lítil bygd kann gera seg so nógv galdandi innan fyri skíøkið, man verða at skúlabørnini fáa ein heila skúladag um vikuna at standa á skíð..

Skíðing er kanska ein sindur dýr ítróttargrein (feria), og har til eisini eitt sindur vandamikil til tíðar um man ikki er nóg ansin. Vegna nógvar smáskaðar og nakrar meira alvorligar skaðar, vóru tað fleiri av teimum eg var saman við, sum ikki komu á mál við skíðingini, sigur Eyðun Joensen.

**mg**



Eyðun saman við nøkrum av teimum hann lærdi saman við til skíðinstruktør

KOYRIKORT

FØROYA BESTI OG BÍLIGASTI KOYRISKÚLI
BYRJAR NÝTT TEORISKEIÐ MÁNADAGIN 15. JUNI

– ENN ERU NØKUR FÁ PLÁSS EFTIR!

MEIRA FÆST AT VITA Á
WWW.FERDSLAN.NET

KOYRISKÚLIN VIÐ ÁRNA OG MARNAR



ÁRNI
222470



MARNAR
214381